# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Útibiografur við Margarinfabrikkina



Nú summarfrítíðin er av, hevur Margarinfabrikkin aftur opið sum vanligt. Í hesum sambandi skipar Margarinfabrikkin fyri útibiografi hóskvøldið.

Tað er skemtifilmurin 'Et sikkert hit' við Hugh Grant og Drew Barrymore, ið verður at síggja. Tiltakið er ókeypis og eisini fáa áskoðarnir ókeypis sodavatn og popkorn. Av tí at filmurin verður vístur úti, er sjálvandi umráðandi, at ein letur seg í eftir umstøðunum og møguliga tekur eitt teppi at fjálga seg við.

Umframt hetta verður høvið at keypa sær ymiskt gott í kioskini og at síggja Margarinfabrikkina í nýggjum hami. Tað eru Scrub. Art og Jelly Kitties, ið hava staðið fyri at prýða veggirnar inni í Margarinfabrikkini.

*nud*

## 40 milliónir hoyra um føroyskan tónleik



**Útvarpssendingin "The Beat" á BBC World Service, sum hevur umleið 40 milliónir lurtarar kring allan heimin, setur hesa vikuna kikaran á G! Festivalin, og føroysk tónleikanøvn sum Teitur og Eivør.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sambært heimsíðuni hjá G!Festivalinum var tíðindakvinnan Deirdre Melvin var á G! Festivalinum í ár og henni dámdi so væl tann føroyska tónleikin, ið hon hoyrdi, at hon valdi at steðga nakrar dagar eyka fyri at kunna smakka meira uppá tónleikin, samfelagið og mentanina og so fekk hon samstundis betri tíð at práta við fleiri føroyskar tónleikarar. Í innslagnum fortelur Deirdre um føroyskt tónleikalív, prátar við Teit og Búa Dam og spælir tónleik hjá Gestum, Eivør, Teiti og Budam.

Umframt G! Festival og føroyskan tónleik eru tvey onnur størri innsløg - eitt um bretska festivalin the Big Chill og eitt um tónleik í Kinshasa í Congo umframt vanlig stutt søgd tónleikatíðindi. Innslagið um G! er tað næsta stóra innslagið í sendingini, skrivar heimasíðan hjá G!Festivalinum.

TRYGD • TÆNASTA • TRIVNAÐUR
- størri TRYGGLEIKA í ferðsluni

SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akstovuna til at byrja skjótast tilber. Talan er um parttíðarstarv.**

UPPGÁVAN
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Sýnsumsiting

FØRLEIKAKRØV
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á at ein hevur góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og tænastuhugaður. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

SETANARTREYTIR
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umfram Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jákup Jacobsen, stjóra, á telefon 350400.
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í **seinasta lagi 20. august 2007.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir kring alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

AKSTOVAN
Hoyvíksvegur 57 • Postsmoga 3206 • FO-110 Tórshavn
Tel. 35 04 00 • Fax 35 04 01 • www.akstovan.fo • akstovan@akstovan.fo




BROYTTAR AVGREIÐSLUTÍÐIR Í AUGUST

Til og við 24. august 2007, verður avgreiðslan opin soleiðis:

MÁNADAG TIL HÓSDAG
frá kl. 12.30 til kl. 15.00

FRÍGGJADAG
frá kl. 12.30 til kl. 14.00

REPROZ

AKSTOVAN
Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo